# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Góða Sólja



Tað er sera ringt at skriva minningarorð um teg góða, tí alt følist so óveruligt. Tú búði í Onglandi, og tí merkja vit ikki at tú ert farin í okkara gerandisdegi, men serliga nú, tá ið summarið er í hondum, fara vit at sakna teg og tína hjáveru heilt ómetaliga nógv.

Onkursvegna følist tað enn sum um tú ert í Onglandi, men nú tá ið familjan hjá tær er í Føroyum, merkist tað íhjartanum, at tú er farin.

28. mai 2005 hevði tú blivið 15 ára gomul. Hendan dagin fara vit at halda saman við tínum ensku vinkonum, ið eru komnar allan vegin til Føroyar at vitja títt føðiland.

Tú fert altíð at vera her í hjørtum okkara, títt vakra smíl og tín positiva útstráling. Tú var altíð líka stuttlig at vera saman við, og nú fer tað at verða so tómt uttan teg.

Vit vóna at Ingun, Janus, Tóra, Anker og Kjartan saman við familju, vinum og kenningum, hóast sorg og sakn, finna ta styrki sum skal til, ið kann fylla tað plássið sum Sólja setti.

Hvíl í friði.

Vónandi hevur tú tað gott. Vit elska teg og fara aldrin at gloyma teg.

**Rebekka, Drós og Heiða.**

## Aggi Ásgerð Ásgeirsdótttir og Lise Honoré í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 27. mai kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Aggi Ásgerð Ásgeirsdótttir og Lise Honoré upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Við á framsýningini hevur Aggi Ásgeirsdótttir blomsturmálningar og Lise Honoré hevur stoyptar posar og pakkar í bronsu.

Framsýningin verður opin til 9. juni, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Aggi Ásgerð Ásgeirsdóttir við tveimum av sínum blomstur-málningum í Galerie Focus. Nakrir stoyptir posar og pakkar hjá Lise Honoré í Galerie eru við á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### 85 ára føðingardagur

Sigurd Joensen í Oyndarfyri verður 85 ár 30. mai.

Føðingardagurin verður hildin í handilskjallaranum hjá Eivindi sunnudagin 29. mai frá kl. 14 til 20 Øll eru vælkomin.

### Dagurin

**26. mai. Beda**, deyður ár 735. Eftirtíðin gav honum navnið *venerabilis*, *hin tignarligi*. Hesin enski munkurin gjørdist ein hin mest metti kirkjulærarin í miðøld við átrúnarligu, søguligu og málsligu bókum sínum. Líka í Føroyum hava teir tikið til Beda og lærdóm hansara.

### Andlát & jarðarferðir

Ingibjørg Fredrikka Hansen, Mikladalur, ættað úr Skálavík andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mánadagin 23. mai, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Kistan við Sigmund Arge Johannesen, Vestmanna fer frá kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin klokkan 17:30. Jarðarferðin verður úr Missiónshúsinum í Vestmanna fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Sigmund, kunnu lata eina gávu til Undirhúsið í Vestmanna. Konto í peningagstovnunum.

*Kelda: Útvarp Føroya*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at

**Kári Vitalis Kruse, lækni**

sonur Evu og Anton Kruse

er deyður, 44 ára gamal

Jarðarferðin verður hósdagin 26. mai kl. 13.00 frá Hersted Øster kirke.

**Familjan**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Svanhild Mohr Joensen**

Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Takk til tykkum á Lágargarði, ið vóru so góð við hana.
Takk til prest fyri góð orð.
Takk fyri minnisgávur til Lágargarð.
Takk fyri alla hjálp og tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Poul Arne,**
**Mourits og Páll Árni**